




# ÁRS FRÁSØGN 2014





IRF

# ÁRS FRÁSØGN 2014

IRF

Myndir:
Jóannis Sørensen
Dreamstime

Svanamerktur prentlutur 541-894

# Innihaldsyvirlit


Upplýsingar um Felagsskapin ..... 4
IRF fyriskipan ..... 5
Limakommunur og fólkatal ..... 6
Leiðslufrágreiðing ..... 7
Hagtøl ..... 11
Høvuðstøl ..... 15
Gongdin í rakstrinum 2006–2014 ..... 18
Rakstrarúrslit samanborið við broyttu fíggjarætlanina fyri 2014 ..... 19
Leiðsluátekning ..... 20
Váttan frá óheftum grannskoðara ..... 21

**Ársroknskapur 1. januar–31. desember 2014**

Nýttur roknskaparháttur ..... 22
Roknskapur 1. januar–31. desember 2014 ..... 24
Fíggjarstøða pr. 31. desember 2014 ..... 25
Roknskapur býttur á økir ..... 26
Notur til roknskapin ..... 27
Gjaldførisfrágreiðing ..... 35
Skjal 1 Rakstrarroknskapur fyri Spilloljuverkið ..... 36
Skjal 2 Rakstrarroknskapur fyri Rottangaskipanina ..... 37
Skjal 3 Rakstrarroknskapur fyri Verkstaðið ..... 38
Skjal 4 Rakstrarroknskapur fyri Vandamikið burturkast ..... 39
Skjal 5 Rakstrarroknskapur fyri Endurnýtsluskipanina ..... 40

# UPPLÝSINGAR UM FELAGSSKAPIN

## Felagsskapurin

| | |
|---|---|
| **Navn:** | **L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin IRF** |
| **Bústaður:** | Víkarvegur 107, 520 Leirvík |
| **Heimstaðarkommuna:** | Eysturkommuna |
| **Arbeiðsgevaratal:** | 353.477 |
| **Stovningarár:** | 1979 |
| **Starvsfólk:** | 70 |
| **Teldubústaður:** | irf@irf.fo |
| **Heimasíða:** | www.irf.fo |
| **Tlf.** | 41 42 43 |
| **Fax** | 41 42 44 |

## Nevnd

Árni Jacobsen, Eysturoy, formaður
Jóanis Lisberg, Suðuroy, næstformaður
Kristian Eli Zachariasen, Norðoyggjar
Jonhard Joensen, Vágar
Petra Iversen, Streymoy
Bárður Olsen, Sandoy



## Stjórn

Poul Andrias Joensen, stjóri

## Grannskoðan

**P/f Januar**
løggilt grannskoðanarvirki
Hoyvíksvegur 5
P.O. Box 30, FO-110 Tórshavn
Telefon: 31 47 00 – Telefax: 35 17 01
Teldubústaður: januar@januar.fo
Heimasíða: www.januar.fo

Ársroknskapurin fyri 2014 er góðkendur á ársaðalfundinum, tann ______________________ 2015

_____________________________________________
Fundarstjóri

# **IRF** FYRISKIPAN 2014

**29 Limakommunur**

**Aðalfundur**

**Nevnd**


Árni Jacobsen
Nevndarformaður


Jóanis Lisberg
Næstformaður


Kristian Eli Zachariasen
Nevndarlimur


Jonhard Joensen
Nevndarlimur


Petra Iversen
Nevndarlimur


Bárður Olsen
Nevndarlimur


Poul Andrias Joensen
Stjóri


Aslaug Gisladóttir
Umhvørvisleiðari


Hallgerð Lervig
Umsitingarleiðari
Bókhald
Lønarroknskapur
Tryggingar


Roar Heini Olsen
Rakstrarleiðari


Jacob Petur Johannesen
Brennistøðin
Spilloljuverkið


Adelbert Ellingsgaard
Rottanga skipanin
Slammsúgving
Endurnýtsla


Jógvan Júst Olsen
Meginøkið, Sandoy og útoyggjar:
Ruskinnsavning
Bingjupláss
Tyrvingarpláss
Bingjur
Flutningur
Serliga dálkandi


Torfinn Mortensen
Suðuroy:
Ruskinnsavning
Umlastingarstøð
Tyrvingarpláss


Hanus Gregersen
Verkstaðið:
Bilar
Bingjur
Maskinur

# LIMAKOMMUNUR OG FÓLKATAL

| Limakommuna – økir | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | PRIMO 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Norðoyggjar** | | | | | | | | | |
| Fugloyar Kommuna | 44 | 43 | 40 | 38 | 38 | 37 | 37 | 42 | 40 |
| Viðareiðis Kommuna | 339 | 352 | 351 | 355 | 348 | 346 | 351 | 347 | 348 |
| Hvannasunds Kommuna | 441 | 435 | 440 | 435 | 426 | 418 | 412 | 402 | 395 |
| Klaksvíkar Kommuna | 4.936 | 4.936 | 4.931 | 4.839 | 4.813 | 4.857 | 4.867 | 4.889 | 4.900 |
| Kunoyar Kommuna | 157 | 160 | 159 | 152 | 140 | 128 | 134 | 127 | 129 |
| Húsa Kommuna | 61 | 60 | 58 | 57 | 54 | 50 | 48 | 48 | 49 |
| **Tilsamans** | **5.978** | **5.986** | **5.979** | **5.876** | **5.819** | **5.836** | **5.849** | **5.855** | **5.861** |
| **Eysturoy** | | | | | | | | | |
| Fuglafjarðar Kommuna | 1.585 | 1.545 | 1.555 | 1.535 | 1.531 | 1.515 | 1.516 | 1.511 | 1.521 |
| Eysturkommuna | 1.936 | 1.963 | 1.959 | 1.962 | 1.978 | 1.977 | 1.934 | 1.933 | 2.001 |
| Nes Kommuna | 1.242 | 1.248 | 1.258 | 1.268 | 1.264 | 1.234 | 1.238 | 1.212 | 1.235 |
| Runavíkar Kommuna | 3.747 | 3.756 | 3.784 | 3.797 | 3.832 | 3.798 | 3.777 | 3.739 | 3.795 |
| Sjóvar Kommuna | 1.028 | 1.019 | 1.013 | 1.005 | 958 | 954 | 943 | 921 | 937 |
| Eiðis Kommuna | 703 | 695 | 695 | 666 | 671 | 663 | 666 | 674 | 683 |
| **Tilsamans** | **10.241** | **10.226** | **10.264** | **10.233** | **10.234** | **10.141** | **10.074** | **9.990** | **10.172** |
| **Streymoy** | | | | | | | | | |
| Sunda Kommuna | 1.565 | 1.591 | 1.650 | 1.648 | 1.659 | 1.674 | 1.636 | 1.644 | 1.646 |
| Kvívíkar Kommuna | 616 | 606 | 604 | 592 | 585 | 588 | 580 | 576 | 570 |
| Vestmanna Kommuna | 1.235 | 1.227 | 1.252 | 1.194 | 1.202 | 1.222 | 1.172 | 1.202 | 1.215 |
| **Tilsamans** | **3.416** | **3.424** | **3.506** | **3.434** | **3.446** | **3.484** | **3.388** | **3.422** | **3.431** |
| **Vágar** | | | | | | | | | |
| Vága Kommuna | 1.891 | 1.912 | 1.949 | 1.943 | 1.939 | 1.967 | 1.959 | 1.963 | 1.990 |
| Sørvágs Kommuna | 1.072 | 1.098 | 1.133 | 1.139 | 1.126 | 1.112 | 1.099 | 1.096 | 1.090 |
| **Tilsamans** | **2.963** | **3.010** | **3.082** | **3.082** | **3.065** | **3.079** | **3.058** | **3.059** | **3.080** |
| **Sandoy** | | | | | | | | | |
| Sands Kommuna | 589 | 577 | 584 | 557 | 556 | 524 | 515 | 515 | 526 |
| Skopunar Kommuna | 508 | 508 | 505 | 490 | 470 | 467 | 470 | 456 | 448 |
| Skálavíkar Kommuna | 184 | 176 | 169 | 164 | 162 | 155 | 152 | 143 | 140 |
| Húsavíkar Kommuna | 131 | 129 | 125 | 126 | 125 | 129 | 123 | 119 | 117 |
| Skúvoyar Kommuna | 57 | 60 | 55 | 51 | 45 | 44 | 45 | 44 | 43 |
| **Tilsamans** | **1.469** | **1.450** | **1.438** | **1.388** | **1.358** | **1.319** | **1.305** | **1.277** | **1.274** |
| **Suðuroy** | | | | | | | | | |
| Hvalbiar Kommuna | 766 | 759 | 733 | 723 | 712 | 709 | 709 | 721 | 724 |
| Tvøroyrar Kommuna | 1.823 | 1.802 | 1.772 | 1.742 | 1.725 | 1.692 | 1.748 | 1.760 | 1.730 |
| Fámjins Kommuna | 114 | 111 | 110 | 108 | 108 | 107 | 105 | 100 | 92 |
| Hovs Kommuna | 125 | 119 | 115 | 122 | 120 | 118 | 118 | 118 | 117 |
| Porkeris Kommuna | 332 | 338 | 335 | 328 | 314 | 314 | 319 | 310 | 301 |
| Vágs Kommuna | 1.403 | 1.417 | 1.405 | 1.361 | 1.376 | 1.377 | 1.325 | 1.324 | 1.331 |
| Sumbiar Kommuna | 383 | 379 | 379 | 377 | 362 | 353 | 365 | 357 | 354 |
| **Tilsamans** | **4.946** | **4.925** | **4.849** | **4.761** | **4.717** | **4.670** | **4.689** | **4.690** | **4.649** |
| **IRF tilsamans** | **29.013** | **29.021** | **29.118** | **28.774** | **28.639** | **28.529** | **28.363** | **28.293** | **28.467** |

# LEIÐSLUFRÁGREIÐING



## Inngangur

Á sumri í 2014 vóru liðin 25 ár, síðani Brennistøðin á Hagaleiti var tikin alment í nýtslu. Roknað bleiv við, at Brennistøðin kom at halda í 15 ár.

Í 2009 fekk ovnurin á Brennistøðini eina stóra dagføring, sum kostaði góðar 35 mió. kr, og sum økti um teoretisku brenniorkuna við ½ tonsi um tíman. Roknað bleiv við, at hendan útbyggingin kom at halda í minst 10 ár.

Vit eru sostatt á einum vegamóti og mugu taka støðu til, hvussu útbyggingin á Hagaleiti skal fara fram.

Sum vit nevndu í ársfrásøgnini í fjør, ber ikki til bert at hyggja eftir, hvussu vit fáa Brennistøðina at halda sum longst. Vit mugu eisini hyggja at rusknøgdunum til Brennistøðina, sum í 2014 vuksu við 16,9%.

Uppgávan er at skipa so fyri, at IRF megnar at taka ímóti og viðgera alt brenniburturkast frá okkara limakommunum og virkjum komandi árini.

## Búskaparliga gongdin

Rakstrarúrslitið fyri 2014 er 6,70 mió. kr. betri enn mett frammanundan.

Inntøkurnar eru 7,82 mió. kr. hægri enn í 2013, meðan útreiðslurnar eru 4,00 mió. kr. hægri.

Samlaðu íløgurnar í 2014 vóru 13,87 mió. kr. Av hesum vóru 10,90 mió. kr. gjørdar í ymiska útgerð, ruskpláss og bingjur. 0,43 mió. kr. í Brennistøðina, 0,67 mió. kr. í nýtt spilloljuverk, 0,19 mió. kr. í Rottangaskipan og 1,68 mió. kr. vóru gjørdar í endurnýtsluskipanina.

Samlaða lánsskuldin er 14,54 mió. kr. lægri enn í 2013, meðan rentuútreiðslurnar eru 0,59mió. kr. lægri.

Avskrivað er eftir sama leisti sum í 2013.

IRF hevur sáttmála við Føroya Landsstýri um rakstur av Spilloljuverkinum. Sambært sáttmálanum verður roknskaparhallið fyri Spilloljuverkið goldið úr Landskassanum, tó ikki meira enn tað, sum er sett av á fíggjarlógini.

Á fíggjarlógini fyri 2014 vóru settar av 3,5 mió. kr. til spilloljureinsing.

Roknskapirnir fyri Spilloljuverkið, Rottanga- og kloakktænastuna, Verkstaðið, Serliga dálkandi burturkast og Endurnýtsluskipanina eru við í høvuðsroknskapinum, men eru samstundis settir upp í egnum skjølum.

Bruttoúrslitið gjørdist 49,95 mió. kr., sum er 4,21 mió. kr. betri enn í 2013. Rakstrarúrslitið gjørdist eitt yvirskot upp á 7,31 mió. kr., sum er 3,82 mió. kr. betri enn í 2013.

Fíggjarstøðan javnvigar við 127,68 mió. kr. í 2014, í mun til 135,08 mió. kr. í 2013.

Við ársenda var jarngoymslan á Gjánoyri tóm.

Gjaldførið var 11,55 mió. kr. við ársenda, sum er 8,94 mió. lægri enn við ársenda í fjør.

## Limakommunur og fólkatal

Fólkatalið í limakommununum 1. januar 2015 er 28.467, sum er ein vøkstur upp á 174 fólk í mun til 1. januar 2014.

Í Sandoynni og í Suðuroynni er fólkatalið minkað við 44 fólkum, meðan tað í Norðoyggjum, Eysturoynni, Streymoynni og í Vágum er vaksið við 218 fólkum.

Í langtíðarætlanini hjá IRF verður roknað við eini hækking í fólkatalinum komandi árini.

## Limagjald

Hin 24. apríl í 2014 samtykti aðalfundurin hjá IRF, eftir tilmæli frá nevndini, at hækka limagjaldið fyri 2015 við 10,- kr./íbúgva, soleiðis at ruskgjaldið verður 1.095,- kr/íbúgva og rottangagjaldið verður 190,- kr/íbúgva.

Nevndin mælir til at hækka limagjaldið fyri 2016 við 10,- kr/íbúgva, soleiðis at ruskgjaldið fyri 2016

verður 1.100,- kr./íbúgva og rottangagjaldið verður 195,- kr/íbúgva.

Ætlanin er eisini at hækka limagjaldið fyri 2017 við 10 kr./íbúgva, soleiðis at ruskgjaldið tá verður 1.105,- kr./íbúgva og rottangagjaldið verður 200,- kr/íbúgva.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Eftir roknskaparlok er einki hent, sum broytir metingina av fíggjarstøðu felagsins.

## Íløgur og fígging

Sum nevnt frammanfyri, hevur IRF gjørt íløgur í 2014 fyri 13,87 mió. kr., harav størstu íløgurnar eru gjørdar í ymiska útgerð, ruskpláss og bingjur.

Ætlanin er at gera íløgur fyri 18,10 mió. kr. í 2015, harav størsta íløgan upp á 8,14 mió. kr. er í bilar. Annars er talan um íløgur í m.a. tyrvingarpláss, bingjur, menning av telduskipanum, nýggja rottangaskipan og eina skipan at skilja jarn úr ilskuni á Brennistøðini, nú vit verða steðgaðir at tyrva í Oyndarfirði.

Ætlanirnar at byggja nýggja móttøku til viðgerð av rottangaevju halda fram.

Mett verður, at hendan íløgan kemur at kosta uml. 35 mió. kr., men meira um hetta seinni.

Fyri at klára íløgutørvin komandi árini verður neyðugt at taka 14 mió. kr. í láni í 2015. Ætlanin er at hava eina afturgjaldstíð upp á 6 ár fyri tað lánið. Flestu av lánunum hjá IRF verða útgoldin í 2018. Tá falla kapitalútreiðslurnar úr 16,5 mió. kr. niður í 5,5 mió. kr, um ikki onnur lán verða tikin.

Verður semja um at byggja nýggja rottangamóttøku, má roknast við, at hendan íløgan eisini skal fíggjast við lántøku.

Hóast nevndu íløgur og lántøku kemur IRF at hava eitt rímiliga gott gjaldføri komandi árini.

## Spilloljuverkið

Spilloljuverkið, sum IRF rekur eftir sáttmála við Føroya Landsstýri, tekur vanliga ímóti uml. 3.500 $m^3$ av spillolju og øðrum oljuúrdráttum árliga. 2014 var tó eitt undantak, tí tá tók verkið ímóti 4.637 $m^3$. Hetta er ein vøkstur upp á uml. 36% í mun til 2013. Høvuðsorsøkin til vøksturin er uttan iva, at uppisjóvarskipini í størri mun leggja veiðuna og harvið eisini spilloljuna upp í Føroyum.

IRF seldi 1.797 $m^3$ av reinsaðari olju í 2014. Hetta er ein vøkstur upp á uml. 45% í mun til 2013. Fjarhitafelagið í Tórshavn, Havsbrún í Fuglafirði og Høvdavirkið í Leirvík eru vanligu móttakararnir av reinsaðari spillolju. Men tá ið tey ikki høvdu møguleika at taka ímóti allari tí reinsaðu oljuni, var neyðugt at selja uml. 43% av landinum í 2014.

Sum áður greitt frá er byggingin av Spilloljuverkinum á Hagaleiti nógv seinkað. Ætlanin var at taka verkið alment í nýtslu í 2014, men er hetta av ymsum orsøkum útsett til fyrra hálvár í 2015.

Høvuðsorsøkin til seinkingina er, eins og áður nevnt, at danski maskinútvegarin fór á húsagang, beint áðrenn arbeiðið varð liðugt, og ikki bar til at taka arbeiðið uppaftur fyrr enn gott hálvt ár seinni.

Nýggja Spilloljuverkið hevur nógv størri móttøkuorku enn gamla Spilloljuverkið, eins og tað í neyðstøðu kann taka ímóti og reinsa munandi størri nøgd av spillolju.

Ætlanin er at rigga av ognirnar á Kambsdali og lýsa tær til sølu í 2015.

## Móttøkuhøll til serliga dálkandi burturkast

Sum áður nevnt, verður móttøkuhøllin til serliga dálkandi burturkast tikin í nýtslu saman við Spilloljuverkinum.

## Rottangaskipanin

Síðani seinasta aðalfund, hevur verið arbeitt við at finna eina loysn til viðgerð av rottangaevjuni í IRF økinum. Eftir ætlan skal nýggja skipanin byggjast í eini høll, har evjan verður reinsað fyri óreinsku og vætan síðani pressað úr henni í eini skrúvupressu. At enda verður evjan turkað og latin í stórsekkir.

Turkaða evjan kann síðani brennast ella nýtast til taðing í Føroyum og uttanlands.

Samstundis sum arbeitt verður við nýggju rottangaskipanini, verður hugt eftir, hvussu vit skulu avrokna kommunur og virki, tá ið nýggja skipanin verður tikin í nýtslu.

Tórshavnar Kommuna og IRF tosa saman um nýggju rottangaskipanina og møguligt samstarv.

## Tyrvingarpláss

IRF hevur trý tyrvingarpláss til blandað burturkast: Tyrvingarplássið í Bø, Tyrvingarplássið í Sandarhaga og Tyrvingarplássið í Trøllavík. Tyrvingarplássið oman fyri Kvívík er ikki í nýtslu longur.

Arbeitt hevur verið við ætlanum um bert at hava eitt høvuðstyrvingarpláss í IRF økinum, og verður í hesum sambandi arbeitt við at útbyggja Tyrvingarplássið í Trøllavík. Hetta arbeiði er komið so mikið áleiðis, at øll loyvir eru fingin til vega. Arbeiðið er boðið út, og er sáttmáli undirskrivaður við tann, sum hevði lægsta tilboðið. Arbeiðið er byrjað í mars 2015.

Arbeiðið kemur væntandi at kosta uml. 6,2 mió. kr.

Umframt ilsku frá Brennistøðini tyrvir IRF árliga eini 1.800 m3 av burturkasti.

## Endi

Í ársfrásøgnini fyri 2013 setti nevndin sær trý sera týdningarmikil mál, at:

- Økja munandi um endurnýtsluna
- Fyrireika nýggja móttøku til rottangaevju
- Byggja nýtt tyrvingarpláss fyri alt IRF økið

  Arbeitt verður áhaldandi við at økja um endurnýtsluna av tí burturkasti, sum IRF móttekur.

  Danir arbeiða víðari við null burturkast hugsjónini og hava valt sær fimm átaksøkir, sum eru:

- Matrestir og annað lívrunnið burturkast frá húskjum og vinnuni
- Endurnýtsla frá byggivinnuni
- Klæðir v.m.
- Elektronikkur
- Pakkitilfar

Nevndin vil leggja dent á at økja enn meira um endurnýtsluna hjá IRF. Her slepst tó ikki undan, at kommunurnar eru meira við í hesi tilgongdini, um hetta skal eydnast.

At byggja eina nýggja móttøkuskipan til viðgerð av rottangaevju er kostnaðarmikið, og er tað tí sera umráðandi, at skipanin helst umfatar allar Føroyar.

Tað er okkara vón, at sjøtul kann setast á hetta arbeiði í ár.

Tyrvingarplássið í Trøllavík skal nýtast fyri alt IRF økið. Eftir ætlan byrjar víðkanin av tyrvingarplássinum í apríl í ár og verður liðug í november ella desember í ár.





# HAGTØL 2014

Øll skráseting av móttiknum burturkasti, undantikið serliga dálkandi burturkast, verður gjørd í $m^3$. Brenniburturkast verður vigað inn í ovnin. Í sambandi við útflutning av burturkasti stavar vektin frá móttakaranum.

IRF tók ímóti 193.291 $m^3$ av burturkasti frá húskjum, bingjuplássum, virkjum og øðrum í 2014 (Talva 1). Tað er ein vøkstur upp á 10,6% í mun til 2013. Nógv tann størsti parturin, góð 73%, varð eisini brendur í fjør.

**TALVA 1** • Burturkastnøgd í $m^3$, sum IRF tók ímóti frá húskjum, bingjuplássum, virkjum og øðrum í 2013 og 2014

| VIÐGERÐ | 2013 | 2014 | MUNUR, % |
|---|---|---|---|
| Brenning | 129.508 | 141.945 | 9,6 |
| Endurvinning | 43.478 | 48.498 | 11,5 |
| Tyrving | 1.821 | 2.848 | 56,4 |
| **Til samans** | **174.807** | **193.291** | **10,6** |

## Endurvinning

Endurvinning av burturkasti umfatar innsavning og útflutning av pappíri, plasti, metalum og elektronikki.

Spillolja, sum verður innsavnað, reinsað og brúkt í Føroyum, verður eisini roknað sum endurvunnið burturkast.

## Pappír og papp

Skiljihøllin á Hagaleiti tekur ímóti pappíri og pappi úr øllum landinum. Í 2014 tók Skiljihøllin ímóti 23.314 m3 av pappíri og pappi, sum er 1,1% minni enn í 2013.

Samlaði útflutningurin av pappíri og pappi var 1.550 tons, sum er 2,2% minni enn í 2013 (Talva 2).

## Plast og gummi

Talan er um stórar plastsekkir, garnaleivdir, polystyrene (flamingo), innballingarplast og einnýtisíløt (PET-fløskur). Í 2014 tók IRF ímóti 7.180 $m^3$ av plastúrdráttum. Tað er ein vøkstur upp á 6,3%. Útflutt vóru 384 tons av plastburturkasti í 2014, sum er 9,7% meira enn árið fyri (Talva 2).

Nøgdin av einnýtisíløtum úr plasti (PET-fløskur) var 2.789 $m^3$ í 2014 í mun til 2.621m3 í 2013. Tað er ein øking upp á 6,4% í rúmd. Útflutningurin var 68 tons í mun til 69 tons í 2013.

## TALVA 2 · Endurnýtsla av burturkasti. Tølini eru avskipað nøgd

| Tilfar | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|
| Pappír og papp, tons | 1.741 | 1.657 | 1.465 | 1.585 | 1.550 |
| Háorkuburturkast, tons | 167 | - | - | - | - |
| Bleytt plast, tons | - | 257 | 257 | 274 | 314 |
| Einnýtis fløskur, tons | - | 58 | 65 | 69 | 68 |
| Einnýtis metalíløt, tons | - | 2 | 9 | 13 | 18 |
| Jarn og metal, tons | 2.266 | 811 | 1.413 | 1.532 | 2.812 |
| Bilar móti endurgjaldi, stk. | 128 | 104 | 134 | 136 | 292 |
| Elektronikkur, tons | 111 | 121 | 124 | 200 | 76 |
| CFC, tons | 75 | 66 | 69 | 71 | 54 |
| Spilloljusøla, $m^3$ | 1.603 | 1.415 | 1.264 | 1.243 | 1.797 |
| Isolatión, tons | - | - | - | 7 | 4 |
| Annað, tons | - | 7 | 6 | 8 | 2 |

## Jarn og metal

IRF tók ímóti 12.137$m^3$ av jarni í 2014, sum er 38,23% meira enn í 2013. Við ársenda í 2014 var jarngoymslan so at siga tóm.

Talið av bilvrakum við skrásetingarskjølum var 292 í 2014 í mun til 136 árið fyri. Hetta eru bilvrak, sum IRF tekur ímóti í Suðuroy, Sandoy og í Klaksvík og avgreiðir endurgjald til eigaran. (Talva 2).

IRF gjørdi eina roynd við at endurvinna bjálvingartilfar, eitt nú glasull og steinull. Hendan royndin eydnaðist ikki nóg væl, og eru vit tí givnir við hesum.

## Elektronikkur

Í 2014 útflutti IRF 76 tons av elektroniskum burturkasti í mun til 200 tons í 2013(Talva 2). Harafturat hava starvsfólk hjá Dugna á Kambsdali tikið 875 teldur sundur í 2014 í mun til 696 teldur árið fyri. Hetta ger, at bert ein partur av teldunum fer av landinum sum elektroniskt burturkast. Húsin fer sum jarn til endurvinning, og plastið verður brent.

Tær vanligu hvítvørurnar verða enn ikki roknaðar upp í elektroniskt burturkast, sum í ES, men verða roknaðar upp í jarn og metal (Talva 2). Í 2014 útflutti IRF 54,4 tons av CFC-burturkasti, sum er kuldaskáp og frystiboksir. Tað er heldur minni enn árið fyri.

## Spillolja

Spilloljuverkini á Kambsdali og Hagaleiti tóku ímóti 4.637 m3 í 2014, sum er 35,8% meira enn í 2013. Sølan av reinsaðari spillolju var 1.797m3 í 2014, sum er 44,6% meira enn í 2013 (Talva 2).

## Brenning

Brennistøðin var í vanligum rakstri alt 2014. Ovnurin brendi 18.659 tons í 7.574 tímar. Vektin var 16,1% hægri enn árið fyri. Í miðal brendi ovnurin 2,46 tons um tíman. Í sambandi við umvælingar á Brennistøðini á Hagaleiti vóru 239 tons brend á Brennistøðini á Hjalla.

Brennistøðin veitti 17.206 MWh av fjarhita til Faroe Marine Products, Høvdavirkið, í 2014 í mun til 20.530 MWh í 2013. Veitingin svarar til ein mátt upp á 2,27 MW hvønn tíma Brennistøðin var í rakstri í 2014, sum er nakað minni enn í 2013.

## TALVA 3 · Brenning av burturkasti

| Evni | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|
| Brent, tímar | 7.379 | 6.998 | 7.318 | 7.204 | 7.574 |
| Brent hjá IRF, tons | 19.556 | 17.532 | 17.683 | 16.077 | 18.659 |
| Brent hjá KB, tons | - | - | 26 | 93 | 239 |
| Brent í alt, tons | 19.556 | 17.532 | 17.709 | 16.170 | 18.898 |
| Brent hjá IRF, tons/tíma | 2,65 | 2,51 | 2,42 | 2,23 | 2,46 |
| Veittur fjarhiti, MWh | 21.679 | 17.801 | 20.820 | 20.530 | 17.206 |
| Roykburturkast á goymslu, tons | 153 | 576 | 371 | 112 | 613 |
| Vátt papp á goymslu, tons | 100 | - | - | - | - |

### Tyrving

Í 2014 tók IRF ímóti 2.841 $m^3$ av burturkasti at tyrva. Trolleivdir, blandað tyrviburturkast, asbest og bjálving vóru størstu bólkarnir.

Tilsaman vórðu 2.195 tons av burturkasti tyrvd á tyrvingarplássunum í 2014 (Talva 4). Hetta eru 56,0% meira enn árið fyri. Harafturat vórðu 2.691 tons av ilsku frá Brennistøðini tyrvd.

## TALVA 4 · Tyrving av burturkasti

| Tilfar | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|
| Ilska, tons | 2.846 | 2.140 | 2.639 | 2.593 | 2.691 |
| Annað, tons | 3.636 | 697 | 783 | 1.407 | 2.195 |

### Serliga dálkandi burturkast

IRF avskipaði 52,1 tons av akkumulatorum í 2014, sum er 5,5% meira enn árið fyri (Talva 5).

Oljuevja frá Spilloljuverkinum verður brend í ovninum á Hagaleiti. Í 2014 var nøgdin 93,70 tons í mun til 15 tons árið fyri.

IRF sendi 223 tons av evju frá nótavaski til viðgerðar í Svøríki í 2014 í mun til 156,9 tons árið fyri.

IRF og Kommunala Brennistøðin hava felags høli at goyma roykburturkast í frá báðum brennistøðunum. Avskipað verður við umleið 16 mánaðum ímillum. Um ársskiftið lógu 1.096 tons á goymslu í høllini í Hvalvík. Parturin hjá IRF var 613 tons. Avskipað verður í februar 2015.

## TALVA 5 · Útflutningur av serliga dálkandi burturkasti

| Tilfar | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|
| Akkumulatorar, tons | 51,8 | 46,7 | 51,5 | 49,4 | 52,1 |
| Spilloljuslam, tons | 105,9 | 16,8 | 20,6 | - | - |
| Evja frá nótavaski, tons | 43,4 | 218,2 | 186,3 | 156,9 | 223,0 |
| Deksvatn frá oljuboring, tons | 285,7 | 122,2 | - | - | - |
| Roykburturkast, tons | 571,5 | - | 695,5 | 669,9 | - |
| Annað, tons | 9,6 | 13,6 | 2,9 | 2,5 | - |

### Rottangatøming

Rottangar verða tømdir í eini tilrættalagdari skipan, sonevnd reglulig tøming. Tangar, sum av onkrari orsøk ikki verða tømdir í regluligu tømingini, verða tømdir í einum eyka tømingarumfari. Rottangabilarnir tømdu tilsamans 7.571 rottangaeindir í IRF limakommununum í 2014. Hetta eru 2.627 meir enn árið fyri (Talva 6).

## TALVA 6 · Tøming av rottangum. Tal av tømdum tangum

| Rottangatøming | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|
| Reglulig tøming | 6.852 | 5.562 | 4.545 | 4.234 | 6.721 |
| Eyka tømingarumfar | 152 | 384 | 371 | 345 | 318 |
| Tilkallitøming | 280 | 547 | 349 | 365 | 532 |
| **Tilsamans** | **7.284** | **6.493** | **5.265** | **4.944** | **7.571** |

# HØVUÐSTØL

| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | | | | | | | |
| Limagjald | 41.962 | 42.445 | 41.518 | 44.176 | 44.584 | 45.337 | 45.796 | 45.321 | 47.061 |
| Aðrar inntøkur | 19.645 | 29.317 | 27.112 | 19.889 | 28.566 | 27.489 | 29.313 | 29.060 | 35.136 |
| **Inntøkur tilsamans** | **61.607** | **71.762** | **68.630** | **64.065** | **73.150** | **72.826** | **75.108** | **74.381** | **82.197** |
| | | | | | | | | | |
| **Útreiðslur** | | | | | | | | | |
| Rakstrarútreiðslur | 45.510 | 50.313 | 54.646 | 48.870 | 51.828 | 51.669 | 54.481 | 54.653 | 58.665 |
| Rentuútreiðslur | 2.861 | 2.656 | 2.637 | 4.794 | 4.633 | 4.899 | 4.793 | 4.720 | 4.126 |
| Avskrivingar | 9.969 | 10.999 | 9.332 | 10.548 | 11.753 | 11.040 | 11.684 | 11.525 | 12.100 |
| **Útreiðslur tilsamans** | **58.340** | **63.967** | **66.615** | **64.213** | **68.214** | **67.609** | **70.958** | **70.897** | **74.891** |
| | | | | | | | | | |
| **Úrslit** | **3.267** | **7.795** | **2.015** | **-147** | **4.937** | **5.217** | **4.151** | **3.484** | **7.306** |
| | | | | | | | | | |
| **Eginogn** | **38.133** | **21.716** | **23.284** | **23.137** | **28.073** | **32.591** | **37.530** | **41.015*** | **48.321** |

*Í roknskapinum fyri 2013 stóð 41.034. Rætta talið er 41.015.



## Inntøkur frá 2006 til 2014




| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Limagjald** | 41.962 | 42.445 | 41.518 | 44.176 | 44.584 | 45.337 | 45.796 | 45.321 | 47.061 |
| **Aðrar inntøkur** | 19.645 | 29.317 | 27.112 | 19.889 | 28.566 | 27.489 | 29.313 | 29.060 | 35.136 |

## Útreiðslur frá 2006 til 2014




| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarútreiðslur** | 45.510 | 50.313 | 54.646 | 48.870 | 51.828 | 51.669 | 54.481 | 54.653 | 58.665 |
| **Rentuútreiðslur** | 2.861 | 2.656 | 2.637 | 4.794 | 4.633 | 4.899 | 4.793 | 4.720 | 4.126 |
| **Avskrivingar** | 9.969 | 10.999 | 9.332 | 10.548 | 11.753 | 11.040 | 11.684 | 11.525 | 12.100 |

## Rakstrarúrslit aftan á avskrivingar og rentur




| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarúrslit** | 3.267 | 7.795 | 2.015 | -147 | 4.937 | 5.217 | 4.151 | 3.484 | 7.306 |

## Egin ogn frá 2006 til 2014




| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Eginogn** | 38.133 | 21.716 | 23.284 | 23.137 | 28.073 | 32.591 | 37.530 | 41.034 | 48.321 |

# GONGDIN Í RAKSTRINUM 2006–2014

| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | | | | | | | |
| Kommunugjøld | 41.962 | 42.445 | 41.518 | 44.176 | 44.584 | 45.337 | 45.796 | 45.321 | 47.061 |
| Virkisburturkast v.m. | 14.116 | 22.104 | 18.252 | 12.287 | 17.713 | 17.406 | 18.339 | 18.478 | 22.147 |
| Spilloljuverkið | 3.776 | 3.736 | 4.687 | 4.637 | 4.044 | 4.926 | 5.349 | 5.085 | 5.912 |
| Verkstaður | 924 | 1.114 | 1.058 | 1.179 | 1.207 | 1.611 | 1.298 | 1.261 | 1.320 |
| Søla | 830 | 2.364 | 3.114 | 1.786 | 5.602 | 3.547 | 4.327 | 4.237 | 5.757 |
| **Inntøkur tilsamans** | **61.607** | **71.762** | **68.630** | **64.065** | **73.150** | **72.826** | **75.108** | **74.381** | **82.197** |
| | | | | | | | | | |
| **Útreiðslur** | | | | | | | | | |
| Sáttmálaarbeiði | 1.424 | 790 | 795 | 156 | 74 | 72 | 101 | 695 | 1.166 |
| Lønarútreiðslur | 20.226 | 20.858 | 21.594 | 22.231 | 21.529 | 21.988 | 22.636 | 22.103 | 22.483 |
| Orka | 1.905 | 2.040 | 2.411 | 2.076 | 2.371 | 2.631 | 2.945 | 3.108 | 3.007 |
| Tilfar | 1.519 | 1.843 | 2.045 | 1.840 | 2.192 | 2.158 | 2.153 | 2.127 | 2.338 |
| Flutningur | 4.772 | 7.615 | 8.964 | 6.187 | 7.282 | 5.427 | 6.158 | 6.751 | 8.328 |
| Viðgerð uttanlands | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 895 | 829 | 823 | 276 |
| Bingjupláss | 116 | 24 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Tyrvingarpláss | 1.237 | 1.352 | 2.259 | 1.791 | 2.296 | 1.359 | 1.804 | 1.324 | 1.985 |
| Størri amboð | 4.933 | 5.142 | 6.263 | 4.791 | 6.195 | 6.965 | 7.423 | 6.491 | 6.983 |
| Skrivstovuhald | 1.418 | 1.538 | 1.423 | 1.498 | 1.435 | 1.476 | 1.427 | 1.837 | 1.837 |
| Maskinanlegg | 2.523 | 2.492 | 1.514 | 1.131 | 1.607 | 1.541 | 1.844 | 1.557 | 2.295 |
| Bygningur | 347 | 639 | 363 | 367 | 401 | 396 | 219 | 394 | 503 |
| Verkstaður, PLC v.m. | 231 | 448 | 550 | 436 | 596 | 420 | 545 | 618 | 802 |
| Ferðing og umboðan | 1.046 | 1.165 | 1.349 | 981 | 896 | 1.044 | 947 | 1.196 | 1.132 |
| Uttanhýsistænastur | 466 | 664 | 739 | 754 | 667 | 850 | 677 | 704 | 734 |
| Tryggingar | 1.510 | 1.524 | 1.750 | 1.380 | 1.016 | 996 | 1.022 | 1.019 | 864 |
| Starvsfólkaútreiðslur | 1.837 | 2.179 | 2.627 | 3.251 | 3.271 | 3.451 | 3.752 | 3.906 | 3.933 |
| | | | | | | | | | |
| **Útreiðslur tilsamans** | **45.510** | **50.313** | **54.646** | **48.870** | **51.828** | **51.669** | **54.481** | **54.653** | **58.665** |
| | | | | | | | | | |
| **Úrslit áðrenn avskriv.** | **16.097** | **21.450** | **13.984** | **15.195** | **21.323** | **21.157** | **20.628** | **19.729** | **23.532** |
| | | | | | | | | | |
| Avskrivingar | 9.969 | 10.999 | 9.332 | 10.548 | 11.753 | 11.040 | 11.684 | 11.525 | 12.100 |
| | | | | | | | | | |
| **Úrslit áðrenn rentur** | **6.128** | **10.451** | **4.652** | **4.647** | **9.570** | **10.117** | **8.944** | **8.204** | **11.432** |
| | | | | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | | | | |
| Bankarentur og prov. v.m. | -154 | -417 | -533 | -203 | -158 | -189 | -297 | 5 | -85 |
| Prioritetsrentur | 3.014 | 3.073 | 3.170 | 4.997 | 4.790 | 5.089 | 5.090 | 4.715 | 4.211 |
| **Rentur tilsamans** | **2.861** | **2.656** | **2.637** | **4.794** | **4.633** | **4.899** | **4.793** | **4.720** | **4.126** |
| | | | | | | | | | |
| **Rakstrarúrslit** | **3.267** | **7.795** | **2.015** | **-147** | **4.937** | **5.217** | **4.151** | **3.484** | **7.306** |

# **RAKSTRARÚRSLIT** samanborið við broyttu fíggjarætlanina **2014**

| kr. x 1000 | Roknsk. | Ætlan | Frávik | Frávik í % |
|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | | |
| Kommunugjøld | 47.061 | 45.615 | 1.446 | 3% |
| Virkisburturkast v.m. | 22.147 | 18.775 | 3.372 | 18% |
| Spilloljuverkið | 5.912 | 5.400 | 512 | 9% |
| Verkstaður | 1.320 | 1.120 | 200 | 18% |
| Søla | 5.757 | 4.100 | 1.657 | 40% |
| **Inntøkur tilsamans** | **82.197** | **75.010** | **7.187** | **10%** |
| | | | | |
| **Útreiðslur** | | | | |
| Sáttmálaarbeiði | 1.166 | 865 | 301 | 35% |
| Lønarútreiðslur | 22.483 | 23.651 | -1.168 | -5% |
| Orka | 3.007 | 3.340 | -333 | -10% |
| Tilfar | 2.338 | 2.296 | 42 | 2% |
| Flutningur | 8.328 | 6.500 | 1.828 | 28% |
| Viðgerð uttanlands | 276 | 724 | -448 | - |
| Tyrvingarpláss | 1.985 | 1.436 | 549 | 38% |
| Størri amboð | 6.983 | 5.276 | 1.707 | 32% |
| Skrivstovuhald | 1.837 | 1.743 | 94 | 5% |
| Maskinanlegg | 2.295 | 1.644 | 651 | 40% |
| Bygningur | 503 | 438 | 65 | 15% |
| Verkstaður, PLC v.m. | 802 | 532 | 270 | 51% |
| Ferðing og umboðan | 1.132 | 1.125 | 7 | 1% |
| Uttanhýsistænastur | 734 | 794 | -60 | -8% |
| Tryggingar | 864 | 851 | 13 | 1% |
| Starvsfólkaútreiðslur | 3.933 | 3.923 | 10 | 0% |
| | | | | |
| **Útreiðslur tilsamans** | **58.665** | **55.139** | **3.527** | **6%** |
| | | | | |
| **Úrslit áðrenn avskrivingar** | **23.532** | **19.870** | **3.662** | **18%** |
| | | | | |
| **Avskrivingar** | **12.100** | **14.598** | **-2.497** | **-17%** |
| **Úrslit áðrenn rentur** | **11.432** | **5.272** | **6.159** | **117%** |
| | | | | |
| **Rentur** | | | | |
| Bankarentur og provisión v.m. | -85 | 0 | -85 | - |
| Prioritetsrentur | 4.211 | 4.657 | -446 | -10% |
| | | | | |
| **Rentur tilsamans** | **4.126** | **4.657** | **-531** | **-11%** |
| | | | | |
| **Rakstrarúrslit** | **7.306** | **615** | **6.691** | **1.087%** |

# LEIÐSLUÁTEKNING

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og samtykt ársfrásøgnina fyri 2014 hjá L/F Interkommunala Renovatións-felagsskapinum IRF.

Ársfrásøgnin er sett upp í samsvari við ársroknskaparlógina og galdandi roknskaparleiðbeiningar.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum, fíggjarligu støðu, rakstrarúrslitinum og peningastreyminum.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin til góðkenningar.

Leirvík, tann 13. mars 2015

## Stjórn:

Poul Andrias Joensen
stjóri

## Nevnd:

Árni Jacobsen
formaður

Jóanis Lisberg
næstformaður

Kristian Eli Zachariasen
nevndarlimur

Jonhard Joensen
nevndarlimur

Petra Iversen
nevndarlimur

Bárður Olsen
nevndarlimur

# **VÁTTAN** FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

Til eigararnar í L/F Interkommunali
Renovatiónsfelagsskapurin (IRF)

## Átekning til ársroknskapin

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin (IRF) fyri roknskaparárið 1. januar–31. desember 2014 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, frágreiðing um eginogn og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

## Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

## Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

